# Býráðið

**Dagfesting:** 28.05.2026 kl. 19:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Ólavur Larsen, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til afgørelse** | | |
| 13/26 | 26/00277-1 | Ársroknskapur 2025 hjá Fuglafjarðar kommunu |
| 14/26 | 26/00278-1 | Eykajáttan mai 2026 |
| 15/26 | 26/00203-2 | Broytan av byggisamtykt (omanfyri gamla ísvirkið) |
| 16/26 | 26/00264-4 | Keypan av matr. nr. 595 |
| 17/26 | 26/00182-2 | útboð av skiftan av græslíkisvølli |
| | | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til afgørelse**

**13/26**
**26/00277-1 Ársroknskapur 2025 hjá Fuglafjarðar kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.05.2026 | 21/26 |
| 2 Býráðið | 28.05.2026 | 13/26 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini og býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið ársfrásøgn og protokol frá løggilda grannskoðanarvikinum Januar við átekningini, uttan fyrivarni ella ískoytisupplýsingar.<br><br>Tað hava verið tríggjar eykajáttanir gjøgnum árið á tilsamans 7.3 mió.kr. harav tær 3.8 mió. kr. eru umraðfestingar og harvið útreiðsluneutralar.<br><br>Roknskapurin vísir eitt hall í gjaldførinum frá rakstri uppá 13.9 mió. kr. móti einum mettum halli uppá 23.9 mió. kr. Fuglafjarðar kommuna hevur tikið 20 mió. kr. í láni í 2025.<br><br>Eysturkommuna hevur í 2025 goldið 4 mió. kr., sambært avtalu millum kommunurnar um at dagføra «64-skúlan»<br><br>Nettoskuldin hjá kommununu hækkaði úr 52% til 60% av eini álíkning frá 2024 til 2025.<br><br>Yvirlit yvir nettoskuld hjá kommununi niðanfyri: |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Gongd í nettoskuld og lániloft 2023 - 2025 | | | |
|---|---|---|---|
| Í t.kr. | 2025 | 2024 | 2023 |
| ***Útjavningarkonto/nettosskuld*** | ***69.671*** | ***56.141*** | ***60.165*** |
| Lániloft (nýggja) t.kr. | | | |
| Kommunuskattur inntøka | 86.128 | 80.695 | 78.306 |
| Kommunuskatta % | 21,25% | 21,25% | 21,25% |
| ***Álíkning umroknað 23%*** | ***93.221*** | ***87.340*** | ***84.755*** |
| Skattur eftirlønargjald | 19.736 | 18.336 | 16.878 |
| Afturbering DIS, FAS o.a. | 2.418 | 2.492 | 2.496 |
| ***Lániloft (nýggja) t.kr.*** | ***115.375*** | ***108.168*** | ***104.129*** |
| ***Nettoskuld %*** | ***60%*** | ***52%*** | ***71%*** |
| Lánimøguleikar | 45.704 | 52.027 | 43.964 |

Niðanfyri høvuðsyvirlit raksturin fyri 2025 samanborið við ætlanina fyri 2025:

| Rakstur uttan íløgur | Ætlan 2025 | Rakstur 2025 | Munur |
|---|---|---|---|
| §1 Kommunal fyrisiting | 13.542.200 | 13.748.111 | 205.911 |
| §2, Almanna & Heilsumál | 31.640.782 | 32.394.494 | 753.711 |
| §3, Børn og Ung | 24.965.644 | 25.177.549 | 211.905 |
| §4, Undirvísing | 4.972.000 | 5.196.550 | 224.550 |
| §5, Mentan og frítíð | 8.518.500 | 8.668.827 | 150.327 |
| §6, Teknisk mál | 10.191.000 | 10.700.567 | 509.567 |
| §7: Kommunal virki | -1.392.000 | 154.618 | 1.546.618 |
| **Rakstur íalt** | **92.438.126** | **96.040.716** | **3.602.590** |
| | | | |
| **Rakstur, íløgur** | | | |
| §1, kommunal fyrisiting | 1.650.000 | 791.939 | -858.061 |
| §2, Almanna & Heilsumál | 3.744.981 | 3.821.925 | 76.944 |
| §3, Børn og Ung | 2.490.000 | 2.367.361 | -122.639 |
| §4, Undirvísing | 8.300.000 | 5.188.573 | -3.111.427 |
| §5, Mentan og frítíð | 1.700.000 | 782.699 | -917.301 |
| §6, Teknisk mál | 12.775.000 | 11.707.162 | -1.067.838 |
| §7: Kommunal virki | 15.340.000 | 14.975.827 | -364.173 |
| **Íløgur íalt** | **45.999.981** | **39.635.487** | **-6.364.494** |
| | | | |
| **Skattainntøkur** | | | |
| Húsaleiguskattur | -50.000 | -19.013 | 30.987 |
| Kommunuskattur | -81.046.547 | -86.109.242 | -5.062.695 |
| Partafelagsskattur | -17.000.000 | -16.204.560 | 795.440 |
| Skattur av kapitaleftirløn | -18.406.000 | -19.736.381 | -1.330.381 |
| Skattur av DIS & FAS | -3.348.000 | -4.548.319 | -1.200.319 |
| Rentur, netto | 5.300.000 | 4.863.335 | -436.665 |
| **Inntøkur í alt** | **-114.550.547** | **-121.754.178** | **-7.203.631** |
| **Gjaldføri frá rakstri** | **23.887.560** | **13.922.025** | **-9.965.536** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Rakstur og íløgur er útgreinað í ársfrágreiðingini fyri 2025. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært §38, stk. 3, 4. petti, skal fíggjarnevndin leggja grannskoðaðan roknskap saman við grannskoðanarfrágreiðingini fyri kommunustýrið til góðkenningar og undirskrivingar. | | |
| Grundarlag | **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>• Kommunustýrislógin<br>**Møgulig fylgiskjøl**<br>• Ársfrásøgn 2025 (Grannskoðanarvirkið Januar)<br>• Protokol 2025 (Grannskoðanarvirkið Januar) | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | n | N |
| | Umsitingarligar | n | N |
| Tilmæli | Mælt verður til at fíggjarnevndin at viðgerða roknskapin fyri 2025 og leggur hann fyri býráðið á komandi býráðsfundi 28. mai 2026 til góðkenningar og undirskrivingar. | | |
| Dagf | 18.05.2026 | | |

4

**Fíggjarnevndin 21. maj 2026:**
Fíggjarnevndin hevur viðgjørt ársroknskapin og protokollina og mælir býráðnum til, at góðkenna roknskapin fyri 2025.

**Býráðið 28. maj 2026:**
Fíggjarnevndin tók einmælt undir við roknskpinum fyri 2025.

**14/26**
**26/00278-1 Eykajáttan mai 2026**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.05.2026 | 25/26 |
| 2 Býráðið | 28.05.2026 | 14/26 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndini og býráðnum |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Nú roknskapurin er tøkur fyri 2025 er staðfest ein minninýtsla á løgum uppá 6,3 mió. kr.<br><br>Hetta kemst av at nakrar íløgur eru seinkaðar og tað at Eysturkommuna síðst í árinum hevur goldið 4 mió. kr. í samband við íløguna í 64-skúlan.<br><br>Tørvur er at fáa flutt játtan uppá íalt 6,25 mió. kr. frá 2025 til 2026 og er hesin peningur býttur á hesar konti:<br><br>**Rakstrarstað** \| **Játtan 2025** \| **Nýtsla 2025** \| **Flyta til 2026**<br>160: Býráðshúsið \| 1.650.000 \| 791.939 \| 850.000<br>430: 64-skúlin \| 12.000.000 \| 8.897.877 \| 3.100.000<br>571: Fótbóltsv. \| 1.100.000 \| 176.538 \| 900.000<br>637: Kirkjug. \| 1.550.000 \| 797.189 \| 750.000<br>674: Vegir (Hellurnar) \| 500.000 \| 492.435 \| 250.000<br>711: Umhvørvispl. \| 2.400.000 \| 2.028.732 \| 400.000<br>**Íalt** \| \| \| 6.250.000<br><br>Harafturat tað er neyðugt at geva eina eykajáttan uppá 100 tkr. til rakstrarstað 536 Mentanarvikan, tí at nettojáttanin av misgáum er lækkað við 100 tkr. í upprunaligu fíggjarætlanini. Hetta komst av, at 100 tkr. vórsu sett á kontu 21 Søla av vørum og tænastum, uttan at hækka játtanina á konto 14 keyp av vørum og tænastum samsvarandi.<br><br>**Til býráðsfundin 28.05.2026**<br>Fíggjarnevndin hevur á fundi 27.05.2026 umrøtt játtanina til at skifta graslíki á fótbóltsvøllinum og mælir til at hækka játtanina til RS 571 við 2,3 mió. kr. afturat. Hetta kemst av príshækkingum og kostnaði av at burturbeina verandi vøll og undirlag.<br><br>Harafturat mælir fíggjarnevndin til at stuðla eini umsókn frá skótaliðnum um at gera spæliplássið við 250 tkr. við eykajáttan á RS 550 Stuðul til mentan v.m. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Samlaða eykajáttanin íroknað flutta óbrúkta játtan frá 2025 verður tí:

| Rakstrarstað | Samlað eykajáttan mai 2026 |
|---|---:|
| 160: Býráðshúsið | 850.000 |
| 430: 64-skúlin | 3.100.000 |
| 536: Mentanarvikan | 100.000 |
| 550: Stuðul til mentan v.m. | 250.000 |
| 571: Fótbóltsv. | 3.200.000 |
| 637: Kirkjug. | 750.000 |
| 674: Vegir (Hellurnar) | 250.000 |
| 711: Umhvørvispl. | 400.000 |
| **Íalt** | 8.900.000 |

Harav eru 6. mió. kr. flutt játtan frá 2025.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Sambært kommunustýrislógini skal eykajáttan samtykkjast av býráðnum í tveimum umførum við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarnevndin ger tilmæli til býráðið hesum viðvíkjandi. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | j | n |
| | Umsitingarligar | n | n |
| Tilmæli | Mælt verður til at fíggjarnevndi viðgerð og ger tilmæli til býráðið um eykajáttan sambært málslýsingini.<br><br>**Til býráðsfundin 28.05.2026**<br>Mælt verður til at býráðið viðgerð og tekur støðu til umbønina um eykajáttan frá fíggjarnevndini uppá íalt 8,9 mió. kr. íroknað flyting frá 2025 uppá 6 mió. kr. Fíggjarnevndin mælir til at fíggja eykajáttanina við innistandandi. | | |
| Dagf | 18.05.2026 | | |



**Fíggjarnevndin 21. maj 2026:**

Fíggjarnevndin metir ikki tað er rætt at flyta 250 tkr. RS674 frá 2025, men mælir í staðin fyri at veita RS674 eykajáttan á 250 tkr., sum verður fíggjað av innistandandi. Fíggjarnevndin

tekur undir við at flyta hinar 6,0 mió. kr. frá 2025 til 2026, at játta 100 tkr. til Mentanardagar og at játta 250 tkr. til stuðulskonto RS550 á mentanarøkinum.

**Býráðið 28. maj 2026:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini um eina eykajáttan uppá íalt 8,9 mió. kr.

7

**15/26**
**26/00203-2 Broytan av byggisamtykt (omanfyri gamla ísvirkið)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 13.04.2026 | 8/26 |
| 2 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 22/26 |
| 3 Tekniska nevnd | 11.05.2026 | 24/26 |
| 4 Býráðið | 28.05.2026 | 15/26 |
| 5 Vinnu- og havnanevndin | 11.05.2026 | 11/26 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Vinnu- og havnanevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Fyri at økja um bústaðarmøguleikar í Fuglafirði er ynski komin um at broyta byggisamtyktina omanfyri «gamla Ísvirki». Ynski er at broyta økið frá D - havnaøki til B - 01 øki ella til annað serstakt B øki.<br>Kaj øki og økið har húsið hjá Bakkafrost liggur verður broytt frá D-øki til G-øki.<br>Ætlanin við økinum er at skapa alternativa bústaðarbygging.<br>Hugsanin er, at á økinum kunnu verða bygdir íbúðarbygningar við upp til trimum hæddum, har atkoma er eisini til niðastu hæddin við vegi.<br>Møguleiki er at sleppa undan kravið til lyft um kjallarahædd ikki er ætlað almenninginum, tó skal møguleikin vera til at gera lyftu til allar hæddir.<br>Ætlanin er at bjóða øki út til arbeiðstakar til alternativa bygging sum tað liggur. Tað er upp til tey bjóðandi at koma við uppskoti, hvussu byggingin verður skipað, og hvat slag av íbúðum verða bygdar.<br>Tilboðini skulu vektast á ein slíkan hátt at Kommunan setir sum treyt, at tað er eitt hóskandi tal av íbúðum í verkætlanini.<br>Byggingin skal vera fjølbroytt við ymiskum íbúðarstøddum, har atlit verður tikið til útsýnið. Dentur verður lagdur á, at byggingin tekur seg væl út, er dygdargóð og fellur væl inn í landslagið.<br><br>**Til fundin 11.05.2026**<br>Økið ið var uppskot til B1 øki má broytast til tí komandi raðfesting av B økið.<br>Uppskot til teks fyri økið: |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

# FUGLAFJARÐAR KOMMUNA

| | | | |
|---|---|---|---|
| | **Ásetingar fyri øki B ?: Alternativ bygging.**<br>• Økið verður ætla til alternativari íbúðar- og húsabygging.<br>• Fyri B ? øki skal støddin á grundstykkjum ikki verða minni enn 150$m^2$, byggistigið má ikki fara upp um 0,5, nettonýtslustigið má ikki fara upp um 1,0. Mesta hædd er 9,0 frá miðaljørðildi. Hæddin fyri einstakar bygningspartar, kann tá eisini verða hægri, um hetta er til fyrimun fyri heildina í økinum, ella um talan er um neyðuga hædd í mun til nýtslu.<br>• Ein partur av teirri minstuvídd verður lagdur av, burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Borgarstjórin og formaðurin í Vinnu- og havnanevnd ynski at málið verður tikið upp<br><br>Til fundin 11.05.2026:<br>Borgarstjórin og kommunustjórin ynskja at taka málið uppaftur við uppskot til broyting av teksti til serstak B økið | | |
| Grundarlag | • Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir<br>• Byggisamtykt fyri Fuglafjørð<br>• BK 17 3.2.2, stk. 6 (lyft)<br>• Kort yvir øki áðrenn broyting<br>• Kort yvir øki eftir broyting | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | x | |
| | Umsitingarligar | x | |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til at broyta øki frá D: havnaøki til Serstakt B øki (B1 ella B2) og til G-øki sambært korti.<br><br>**Til fundin 11.05.2026**<br>Tekniski leiðarin mælir til at broyta øki frá D: havnaøki til Serstakt B øki (raðfesting verður sett á seinri) og til G-øki sambært korti. | | |
| Dagf | 07.05.2026 | | |

**Vinnu- og havnanevndin 13. apríl 2026:**
Vinnu- og havnanevndin tekur einmælt undir við tilmælinum, men mælir til at leingja øki B og G út til rørportrið á Leitinum

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:**
Tekniska nevnd tekur undir við tilmælinum og at broytingin í vinnu- og havnanevndini verður fylgd

**Vinnu- og havnanevndin 11. mai 2026:**
Vinnu- og havnanevndin tekur einmælt undir við tilmælinum, víst verður til kort 3.

**Tekniska nevnd 11. mai 2026:**
Tekniska nevnd tekur einmælt undir við tilmælinum, víst verður til kort 3.

**Býráðið 28. maj 2026:**
Dávur kemur við broytingaruppskoti um at taka útfyllingina við í G ásetingina tá kortið verður teknað.

Býráðið atkvøddi fyrst fyri broytingaruppskotinum hjá Dávur Juul og tók býráðið einmælt undir við broytingarupsskotinum.

Síðani varð atkvøtt fyri tilmælinum frá Vinnu- og havnanevndini og teknisku nevnd og tók býrráðið einmælt undir við hesum.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 21.15

Dávur Juul

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Eivin Breiðaskarð

Sonni á Horni

Jóan Pauli Olsen

Jastrid á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Kristian Martin Petersen



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo